# Nýtt samkomuhús í Kollafirði

*Samkomuhúsið Zion hjá Brøðrasasmkomuni í Kollafirði er í minna lagi, og nýggjur salur verður bygdur beint innan fyri skúlan*



*Grivið er út fyri nýggja samkomuhúsinum hjá Brøðrasamkomuni í Kollafirði* *Mynd Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

**Kollafjørður:** Brøðrasamkoman í Kollafirði er farin undir at byggja nýggjan sal, sum skal koma í staðin fyri Zion, sum er vorðið ov trongligt.

Niðan við ánni beint innanvert skúlan í Kollafirði er grivið út og planerað fyri nýggjum bygningi. Tað er Brøðrasamkoman, sum byggir nýggjan sal, har ætlanin er at hava fleiri og fjølbroytari tiltøk, enn pláss er fyri í gamla Zion, sigur Bjarni Jøkladal í Kollafirði, sum er ein teirra, sum varðar av brøðrasamkomuni í Kollafirði.

Bjarni Jøkladal sigur, at tey hava fyri fleiri árum síðan søkt um at sleppa at byggja nýggja sal har, sum nú verður bygt. Tá varð umsóknin ikki gingin á møti av bygdarráðnum, men samkoman fekk ávíst annað stað, har byggjast kundi. Tað staðið dámdi teimum sjálvum ikki, sigur Bjarni Jøkladal, so har varð líkasum einki burtur úr ta ferðina.

Síðan høvdu tey í samkomuni ætlanir um at byggja gamla salin út. Men tað gekk heldur ikki. Hesaferð var tað tó ikki bygdarráðið, men Landsverkfrøðingurin, sum legði seg í buktina. Víst varð á, at húsið lá alt ov nær høvuðsvegnum til, at tað kundi verða givið loyvi til slíka almenna bygging.

So varð søkt einaferð aftur um bygiloyvi á staðnum, har tey upprunaliga søktu. Og hesaferð bar til. Tey fingu loyvi.

Grivið varð út seint í summar, og nú er um at vera liðugt planerað, sigur Bjarni Jøkladal.

Hvussu víðari verður við byggingini nú beinanveg er hann ikki heilt vísur í, men væntar tó, at stoypingini verður fingin frá hondini rímiliga skjótt.

Samkoman er lítil sigur hann, og ikki er ætlanin at taka lán til húsið. Tí verður arbeitt, sum fígging er til. Bjarni Jøkladal sigur, at tað verða helst fólk í samkomuni, sum sjálvboðin fara at gera arbeiðið.

Tað er ikki tí, at samkoman í Kollafirði ikki fær verið inni í Zion til vanlig møti og tílíkt, at nýtt hús verður bygt nú. Men meira tí, at ætlanin er at fáa í gongd undómsarbeiði og annað frítíðar- og sosialt arbeiði, sigur Bjarni Jøkladal. Og teir møguleikarnir eru ikki í Zion. Men í nýggja húsinum verða góðir møguleikar í kjallaranum til slík tiltøk, eins og hølini kunnu brúkast til smærri møti og annað.

Sum sagt verður arbeitt eftir førimuni, so endalig kostnaðar- og tíðarætlan er ikki ásett, sigur Bjarni Jøkladal frá Brøðrasamkomuni í Kollafirði.

Annars er annað stórt útgravingarabeiði í grannalagnum. Beint oman fyri skúlan verður gjørt klárt at byggja ítróttarhøll.

# Nú fært tú alt at vita á Vaglinum

*Fyri at havnaborgarar kunnu sleppa undan at renna runt á ymsum stovnum hjá kommununi, hevur býráðið nú tikið stig til eina avgreiðslu, sum kann taka sær av mestsum øllum málum*

STEFAN Í SKORINI

Nýggja avgreiðslan lat upp týsmorgunin klokkan 9, og hon veður nevnd Snarskivan, har allir borgararnir kunnu venda sær við trupulleikum og ivamálum. Hetta er galdandi fyri mál, sum ikki krevja umfatandi málsviðgerð. Snarskivan er í gamla posthúsinum við síðuna av býráðnum.

Býráðið væntar, at Snarskivan fer at lætta munandi um hjá málsviðgerðum og málið er, at tænastustigið skal hækka. Ein stórur partur av servitanini er nú savnaður á einum stað, og endamálið er, at fólk skulu kunna fáa skjótt svar uppá fyrispurningar. Hetta verður eisini við til at minka um fjarstøðuna millum borgaran og kommununa.

Snarskivan verður opin mánadag, týsdag, mikudag og fríggjadag frá kl 9.00 til 16.00. Hósdag er opið frá 9.00 til 18.00. Telefonavgreiðsla verður somu tíðir.



*Starvsfólkið á Snarskivuni savnað uttan fyri teirra nýggja arbeiðspláss týsmorgunin, tá Snarskivan læt upp*

*Mynd: Jens K. Vang*



# Danir bíða eftir føroyskum útspæli

*Danski løgmálaráðharrin er klárur at koma til Føroya til ávegis samráðingar í fullveldismálinum, so skjótt hann fær eitt útspæl frá landsstýrinum*



*Frank Jensen, løgmálaráðharri, er til reiðar at koma til Føroya, so skjótt hann hevur fingið boð frá Høgna Hoydal*

JOHN JOHANNESSEN

Orsøkin til, at eingin av avtalaðu ávegis samráðingarfundunum í fullveldismálinum enn er hildin millum danskar ráðharrar og føroyskar landsstýrismenn er, at einki útspæl er komið frá føroyingum.-

Hetta staðfestir danska forsætismálaráðið fyri Sosialinum.

Poul Nyrup Rasmussen og Anfinn Kallsberg hava avtalað, at danski løgmálaráðharrin, Frank Jensen, og Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, skulu hittast í Føroyum at samráðast um felags umsiting og ríkisborgararættindi.

Hendan avtalan stendur við, siga høgt standandi embætisfólk hjá danska forsætisráðharranum.

– Frank Jensen er til reiðar at koma til Føroya so skjótt hann hevur fingið eitt útspæl frá landsstýrinum at samráðast eftir, eru boðini úr forsætismálaráðnum.

Ætlanin var eisini, at danski búskaparráðharrin, Marianne Jelved, skuldi koma til Føroya at samráðast við Karsten Hansen, landsstýrismann í fíggjarmálum, um hvussu Føroyar kundu fáa eitt gjaldoyrasamstarv við Danmark, um Danmark fór upp í samstarvið um evruna.

Men tá úrslitið av donsku fólkaatkvøðuni um evruna var eitt greitt nei til evruna, heldur hvørgin parturin hendan fundin vera neyðugan.

Fjóðra umfar av fullveldissamráðingunum verður í Keypmannahavn hósdagin 26. oktober. Tískil má ávegis samráðingarfundurin millum Frank Jensen og Høgna Hoydal haldast innan fjúrtan dagar.

# Norðurlendska samstarvið skal styrkjast

*Hugburðurin i norðurlendska samstarvinum skal styrkjast og broytast frá at vera eitt samstarv um innanhýsis norðurlendskan politikk til eitt samstarv um at standa saman í altjóða politikki, heldur vísmannabólkurin, sum hevur gjørt frágreiðing um norðurlendska samstarvið*

JOHN JOHANNESSEN

Alsama víðkanin av ES krevur, at Norðurlond taka stigið frá at samskipa síni sjónarmið innanhýsis í norðurlendska samstarvinum til at røða við felags rødd í ávísum málum á altjóða politiska pallinum.

Hetta er ein av niðurstøðunum hjá vísmannabólkinum, sum samstarvsráðharrarnir í Nordisk Ministerråd á sumri 1999 settu at meta um framtíðina hjá norðurlendska samstarvinum.

Vísmannabólkurin, sum hevur verið umboðaður av einum limi úr hvørjum einstøkum Norðurlandi, legði frágreiðing sína fram á tíðindafundi í Keypmannahavn.

## Felags talurør

Vísmannabólkurin vísir í frágreiðing síni á, at vaksandi altjóðagerðin sýnir okkum, at eitt einsamalt land er vorðið ov lítið til at loysa mál á atljóða støði. Tí heldur bólkurin vanda vera fyri, at Norðurlond detta burturímillum í atjóða politikki, um tey ikki standa sum ein, bæði tá tað ræður um ES og um atjóða politikk.

Tí hevur bólkurin í arbeiði sínum roynt at koma burtur frá gamla sjónarmiðnum, ið fyrst og framt sær norðurlenska samstarvið sum eitt innanhýsis samstarv millum Norðurlond. Í staðin sær bólkurin norðurlendska samstarvið sum eitt politiskt amboð á altjóða leikpallinum.

Fyri at hetta skal bera til, mælir vísmannabólkurin til at styrkja bygnaðin av samstarvinum, styrkja vælferðina og norðurlendska kappingarførið, styrkja verndina av umhvørvinum og styrkja trygdarpolitisku áhugamálini og verjusamstarvið.

Føroyska umboðið í vísmannabólkinum er Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri í Undirvísingar og Mentamálastýrinum.



*Jóannes Dalsgaard er føroyska umboðið í vísmannabólkinum*

# Seta fokus á Føroyar

*Stórt norðurlendskt blað fyri handils- og vinnulívsfólk, sum áður hevur mett Føroyar sum eitt lítlan part av Danmark, ið lítið kann geva heimssamfelagnum, hevur nú fingið beint øvugtu fatan av Føroyum*

JOHN JOHANNESSEN

Stóra norðurlendska tíðarritið fyri vinnu- handilsfólk, Northern Enterprise, staðfestir, at Føroyar hava eitt sjálvstøðugt og blómandi vinnulív. Tí hevur blaðið nú givið føroyska flagginum pláss á forsíðuni, samstundis sum fokus verður sett á Føroyar.

Áður hevur blaðið bert sæð Føroyar sum ein part av Danmark, og hevur tað tí eisini viðgjørt Føroyar sum ein part av Danmark.




Men eftir at stjórin á tíðarritinum, Edward James Crockford, í summar vitjaði í Føroyum, hevur blaðið fingið eina aðra fatan av landinum.

Í oddagreinini í utgávuni fyri november skrivar blaðstjórin, at blaðið vanliga hevur mett Føroyar vera ein lítlan part av Danmark, ið lítið hevur at bjóða altjóða samfelagnum.

– Men vit fóru ógvuliga skeiv, staðfestir Edward James Crockford.

Blaðstjórin vísir á, at tá hann í juni vitjaði í Føroyum, fann hann út av, at Føroyar hava eitt blómandi vinnu- og handilslív. Tí verður Føroyar nú viðgjørt sum sjálvstøðugur partur í blaðnum. Og í september útgávuni er rúgvismikið tilfar um Føroyar.

Blaðið hevur eisini fingið umboðsfólk í Føroyum. Umboðsfólkið er Lynn Reveal.

# Settu hol á fíggjarlógina

JOHN JOHANNESSEN

Løgtingið fór í gjár undir fyrstu viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001.

Tað eru nú 12 dagar síðani landsstýrismaðurin í fíggjarmálum legði fíggjarlógaruppskotið fyri 2001 fyri tingið, og tigformaðurin metir, at tingfólk hava fingið nóg mikið av tíð til at seta seg inn í uppskotið.

Tí hevði tingformaðurin sett fyrstu viðger av fíggjarlógaruppskotinum sum einasta mál á dagsskránna fyri tingfundin, sum varð settur klokkan 10 í gjár.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2001 líkist í høvuðsheitum ógvuliga nógv fíggjarlógini fyri ár 2000, og leggur tað upp til eitt yvirskot á hálva milliard.